## Fleiri arbeiðsleys í Finnlandi

Arbeiðsloysið í Finnlandi veksur støðugt. Tey seinastu tølini siga, at nú eru 8,3 prosent av arbeiðsfjøldini arbeiðsleys. Fyri einum mánað síðani var talið 7,6 prosent. Sostatt eru 42.000 finnlendingar komnir í arbeiðsloysiskipanina tann seinasta mánaðin, og nú hava 222.000 fólk har einki arbeiði, skrivar tíðindastovan FNB. Tølini vísa, at tað eru serliga tey yngru, sum missa arbeiðið. Eitt nú eru 17,5 prosent av teimuim 15 til 24 ára gomlu arbeiðsleys. Finska hagstovan sigur, at eftirspurningurin eftir finskum vørum er minkaður, og at tað er orsøkin til tað veksandi arbeiðsloysið.

## Stríð um fiskimenn

Tey bæði stóru reiðaríni í grønlendsku rækjuvinnuni, Royal Greenland og Polar Seafood, eru í ferð við at stovna eitt fiskimannafelag uttan um tað kenda fiski- og veiðimannafelagið KNAPK. Leif Fontaine, sum er formaður í KNAPK, sigur við grønlendska kringvarpið málið hjá teimum báðum fyritøkunum er at taka tað fíggjarliga grundarlæagið undan tí gamla fiski- og veiðimannafelagnum. Men tað avsannar stjórin í Royal Greenland, Paviaraq Heilmann. Hann sigur við KNR, at málið hjá teimum báðum fyritøkunum er at skipa øll fiskivinnuáhugamálini í eitt felag, so høvuðsvinnan kann standa sterkari.

# - Daman er stolin

**Tað er ikki altíð líka tespiligt, at damurnar standa í garðinum. Hetta upplivdi Osmundur Brandarsker, tá hann í gjár legði til merkis, at ein av marmordamunum, ið hava staðið í garðinum í nýggju ár, var burtur**

STULDUR
*Eirikur í Jákupsstovu*
*eij@sosialurin.fo*

- Daman er vekk, er tað fyrsta Osmundur Brandarsker sigur, tá hann ringir á Sosialin. Blaðmaðurin er ikki heilt álvuligur, og spyr nær hon bleiv burtur.

- Hon hevur verið vekk síðan í gjár, og hon hevur staðið í garðinum í nýggju ár, sigur Osmundur Brandarsker, við eini rødd, sum tað sama kundi merkt, at onkur hevði stolið eina kvinnu úr kjøti og blóðið.

Nú fellir fimmoyrað. Tað er ein standmynd, sum er stolin.

### Tung dama

Talan er um tríggjar standmyndir úr marmori, sum Osmundur Brandarsker hevur havt standandi í garðinum í fleiri ár.

Tær eru úr gróti og jarni, og eru tí tungar at dansa við.

- Tað eru helst nakrir ungdómar, sum hava stolið hana, og eg haldi tað vera nógv fyri, at fleiri mans fara stríðandi við eini damu, sum bara fríðkar í býnum, sigur Osmundur Brandarsker, ið illa kann trúgva, at nakar einsamallur er farin við damuni.

Osmundur Brandarsker greiðir somuleiðis frá, at hann hevur meldað tilburðin, og at løgreglan hevur lovað at siga honum frá, um onkur greiðir teimum frá, at hon er funnin.

- Er hon brotin, so veit eg ikki reiðiliga, um eg vil hava hana aftur, staðfestir hann.



*Osmundur Brandarsker bleiv rættilig skakkur, tá hann í gjár legði til merkis, at ein av hansara trimum damum var stolin*






*Buzz Aldrin er ein stórur filmur, ið kemur at koyra í fýra pørtum í øllum Norðurlondum, og partur av honum verður tikin upp í Føroyum. Enn leita tey eftir fólkum til at vera við í filminum*

# Leita framvegis eftir fólki til Buzz Aldrin

**Enn eru ikki allar rollur í Buzz Aldrin fyltar. - Nú venda vit okkum til pedagogar, lærarar, sjúkrasystrar, krambakvinnur og onnur fyri at finna hesar týpurnar**

FILMSUPPTØKUR
*Rógvi Nybo*
*rogvi@sosialurin.fo*

Í eina tíð hava royndarfilmingar verið til stóru verkætlanina at gera leikin Buzz Aldrin til film. Men ikki allar rollurnar eru fyltar, og tey leita framvegis eftir nøkrum fólkum.

- Vit vilja gjarna fáa fatur á kvinnum og børnum, ið møguliga eru áhugað í at vera við í filminum. Tað sigur Eyð Matras, samskipari av upptøkuroyndunum her í Føroyum.

- Tey, sum eru von at spæla, venda sær sjálvandi fyrst til okkum. Nú hava vit mest sum fingið tey upp á pláss, og nú leita vit eftir hinum fólkunum, vísir Eyð Matras á.

Serliga er tað tríggjar týpur av kvinnum, tey leita eftir.

Ennen, ið er ein myrk vøkur, døpur týpa, og hevur eitt sindur sárt sinnalag.

Eyðdis, sum er einlig mamma, frisør, skiftur hárlit alla tíðina og droymur um ein maka.

So er tað Anna, ið er tann móðurliga týpan, sum er myrkarædd og elskar at binda.

Eisini leita tey eftir einum smádrongi at spæla leiklutin sum Sofus. Tað er ein drongur, ið er í 8 til 10 ára aldri.

- Hann er gjarna opin, hevur eitt serligt »glimt« í eyganum og hevur altíð skálkin aftanfyri oyrað« sigur Eyð Matras.

Buzz Aldrin er ein stórur filmur, ið kemur at koyra í fýra pørtum í øllum Norðurlondum.

- Hetta er eitt gott høvi hjá føroyingum at gera vart við seg. Tað vil sjálvandi vera ynskiligt at fylla hesar rollurnar við føroyskum leikarum. Nú venda vit okkum til pedagogar, lærarar, sjúkrasystrar, krambakvinnur og onnur fyri at finna hesar týpurnar.

Áhugað kunnu venda sær til Eyð Matras á tlf. 27 08 89 ella eymatr@olivant.fo.